Ráðgevarafelagið

ÁRSFRÁGREIÐING

2021

Til aðalfundin 26. apríl 2022

INNIHALDSYVIRLIT

Endamál felagsins3

Nevndin í Ráðgevarafelagnum 3

Limatal 3

Limagjald 3

Endamál felagsins 4

Árið 2021 5

Virksemið hjá Ráðgevarafelagnum 5

Ráðgevarablaðið 5

..... 6

Hagtøl um ráðgevaravinnuna 6

Førleikamenning 6

Regluverk og avtalur 7

Nýggjan skrivara 7

Nýggj heimasíða 7

Umboðan mótvegis myndugleikum og samfelagnum sum heild 7

Støðan nú og frameftir 7

Nógv virksemi seinastu árini 7

Korona 8

Hagtølini fyri 2020 8

Skjal 1 9

Limalistin 9

Skjal 2 10

Viðtøkur felagsins 10

Skjal 3 13

Veitingarskrá felagsins 13

Endamál felagsins

Nevndin í Ráðgevarafelagnum

Klæmint Eliasen, nevndarformaður

Rúni Abrahamsen, næstformaður

Eyðbjørn Brimnes

Árni Jakobsen

Selmar Nielsen

Eykavald:

Heidi Poulsen

Pætur Húsgarð

Limatal

Í felagnum eru 27 limir.

Limagjald

Limagjaldið er kr. 4.000 pr. atkvøðu. Atkvøðubýtið er ásett eftir starvsfólkatalinum hjá limunum umroknað til fullan dag soleiðis:

Limirnir hava eina atkvøðu fyri upp til 3 ársverk

millum 4 og 10 ársverk tvær atkvøður

millum 11 og 20 ársverk tríggjar atkvøður

millum 21 og 50 ársverk fýra atkvøður

fyritøkur við fleiri enn 51 ársverkum fimm atkvøður.

Á seinasta aðalfundi varð avgjørt at at hækka limagjaldið frá 3.000 til 4.000 kr pr. atkvøðu fyri at sleppa undan áhaldandi halli í ársroknskapinum. Limagjaldið hevur annars staðið í stað síðani 2008.

Endamál felagsins

Endamál felagsins er at savna allar ráðgevandi fyritøkur í byggivinnuni við heimstaði í Føroyum at útinna felags áhugamál. Í virki sínum skal felagið skipa fyri felags menning í vinnugreinini, bæði í virkjunum, og av teimum kørmum, virkað verður undir. Millum limirnar skal felagið stuðla undir samskifti og førleikamenning, og úteftir virka sum felags málgagn mótvegis myndugleikum, stovnum og aðrari vinnu.

Eitt av týdningarmestu málunum, sum felagið alsamt arbeiðir við er, at samskifta við almenna byggiharran um, hvørji viðurskifti skulu vera galdandi, tá byggiverkætlanir verða skipaðar. Ráðgevarafelagið heldur, at tað er av alstórum týdningi, at føroyskar fyritøkur fáa javnbjóðis høvi at bjóða seg fram ájavnt við útlendskar fyritøkur.

Árliga gevur felagið út Ráðgevarablaðið. Endamálið við Ráðgevarablaðnum er at varpa ljós á førleikarnar í føroysku ráðgevaravinnuni og við myndum og umrøðu at økja og betra um fatanina av vinnugreinini millum privatu vinnuna, politisku skipanina, almennar myndugleikar og millum manna.

Árliga heintar felagið inn hagtøl, sum lýsa virksemi og gongdina í vinnugreinini. Hagtølini verða lýst nærri seinni í frágreiðingini.

Felagið hevur eisini eitt yvirlit yvir tær veitingar, sum limir í felagnum bjóða fram. Yvirlitið liggur seinni í frágreiðingini og er at finna á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum.

Somuleiðis hevur felagið gjørt eina standard ráðgevaraavtalu saman við byggiharrasamatakinum. Avtalan liggur á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum og kunnu limir í felagnum taka hana niður har.

Ráðgevarafelagið heldur til í Vinnuhúsinum

Árið 2021

Virksemið hjá Ráðgevarafelagnum

Síðan seinasta aðalfund hava 9 nevndarfundir verið, umframt aðrir fundir í mun til virksemið hjá felagnum. Á skránni hjá nevndini hava verið tey mál, sum seinastu árini eru vorðin fastur táttur av virkseminum hjá felagnum.

Ráðgevarablaðið

Endamálið við Ráðgevarablaðnum er at styðja upp undir samskifti og førleikamenning millum limafeløgini og at virka sum felags málgagn mótvegis myndugleikum, stovnum og aðrari vinnu í málum, sum viðkoma ráðgevaravinnuni.

Í redaktiónini eru í løtuni Klæmint Eliasen, Kári Dahl Christiansen og Eyðun Eliasen.

Nevndin hevur lagt rætningslinjur fyri arbeiðið og góðkennir fíggjarætlanina. Innihaldið í blaðnum verður eisini gjørt tøkt sum tíðindagreinar at leggja út á heimasíðuna hjá Vinnuhúsinum, tá blaðið verður útgivið – hetta fyri at fáa enn meira umrøðu av blaðnum. Blaðið sjálvt liggur eisini á heimasíðuni í sínari heild saman við øllum teimum fyrru útgávunum.

Seinasta útgávan var um burðardygga bygging og kom út samstundis sum Ráðgevarafelagið við sera góðari undirtøku skipaði fyri stevnu um sama mál.

Nevndin hevur umhugsað at geva blaðnum eitt “facelift”, so tað betur kann tiltala tað yngra ættarliðið – tó havandi í huga, at hetta er eitt fakligt blað við rættuliga avmarkaðum budget. Niðurstøðan var, at hetta verður ikki gjørt nú, men ætlanin er at venda aftur til hendan spurning seinni.

Evnið til komandi útgávu er ikki valt enn og limir eru vælkomnir at koma við uppskotum.

Hagtøl um ráðgevaravinnuna

Á hvørjum ári heintar Ráðgevarafelagið inn hagtøl frá limunum. Endamálið við hesum er at fáa vitan til vega um, hvussu gongdin er í vinnugreinini. Hagtølini lýsa umsetningin og kundasamansetingina í vinnuni. Seinni í frágreiðingini er vinnan lýst við grundarlagi í hagtølunum og verða hagtølini eisini lýst í árligu útgávuni av Ráðgevarablaðnum.

Nevndin hevur umrøtt møguleikan fyri at gera veitingar innan umhvørvi og grønar loysnir meiri sjónligar í hagtølunum, men hevur lagt hetta til viks aftur, tí tað flættar seg inn í næstan øll onnur økir og hevur eisini tann vanda í sær, at tølini hjá einstøkum feløgum kunnu gerast ov sjónlig.

Førleikamenning

Ein partur av endamálinum hjá Ráðgevarafelagnum er at skipa fyri førleikamenning fyri starvsfólk í limafyritøkunum. Regluliga eru skeið fyri limir, sum altíð hava fyrsta rætt at møta og til serprís. Hesi skeið geva vanliga eitt yvirskot, so sum framgongur av roknskapinum.

Málið er at skipa fyri tveimum skeiðum um árið. Farna árið hevur arbeiðið at fyriskipa skeiðum sjálvandi verið darvað av koronu, men tað eydnaðist tó at hava skeið í anslags metoden tann 29. September 2022 fyri 29 fólkum frá limafyritøkunum, sum eydnaðist væl.

Tað eydnaðist somuleiðis at skipa fyri rættuliga stórari ráðstevnu um burðardygga bygging tann 24. November 2021 saman við Handverkmeistarafelagnum og Byggiharrasamtakinum, sum fekk góða undirtøku og eydnaðist væl. Ætlanin er skipa fyri líknandi stevnu aftur um okkurt um 2 ár fyri soleiðis at vera við til at menna um hetta øki í Føroyum.

Í næstum verður skipað fyri skeið um AB18 og ABR18 í samband við at hetta nú væntandi verður innført her heima.

Ráðgevarafelagið hevur ætlanir um onnur skeið í 2021, men enn er ikki avgjørt hvørji hesi verða og nær. Ætlanin er at kanna, um tað ber til at fáa í lag at hava skeiðið “fra ingeniør til rådgiver” sum Foreningen af Rådgivende Ingeniører(FRI) bjóðar út her heima.

Regluverk og avtalur

AB18 og ABR18

Ráðgevarafelagið hevur støðugt víst á tørvin á, at vit í Føroyum fyrihalda okkum til bæði AB18 og ABR18, um ABF06 skal dagførast til AB18, sum serliga byggiharrasamtakið hevur ynski um. Ráðgevarafelagið hevur verið partur av bólkinum sum fæst við at fyrireika innføring av AB18 og ABR18 og hevur lagt stórt arbeiði í hetta mál – sum tað nú næstan er komið á mál við. Sjónarmiðið hjá Ráðgevarafelagnum hevur alla tíðina verið, at um AB18 og ABR18 skulu innførast her heima, so skal hetta gerast við so fáum viðmerkingum sum gjørligt til tann upprunaliga danska tekstin og hevur hetta sjónarmið vunnið frama.

Í samband við arbeiðið við at dagføra avtaluverkið fyri byggivinnuna er eisini farið í gongd við at orða felagsskjøl so sum skapilónir til sáttmálar. Ætlanin er at fáa ein løgfrøðing at gjøgnumganga hesi.

BK17

Arbeiðið at dagføra bygningskunngerðina BK17, sum er frá 2017, er enn ikki farið í gongd, men formaðurin í Ráðgevarafelagnum hevur tann 12. Januar 2022 skrivað til landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum og gjørt vart við, at felagið metir at tíðin er komin at endurskoða bygningskunngerðina, soleiðis at tær royndir, sum byggiharrar, ráðgevaravinnan og byggivinnan hevur gjørt sær við henni – umframt nýggj vitan á økinum – verður arbeitt inn í eina dagførda kunngerð - umframt eisini at rætta beinleiðis villur, sum vit longu nú eru vitandi um.

Nýggjan skrivara

Ráðgevarafelagið heldur til hjá Vinnuhúsinum og hevur Marita Rasmussen verið skrivari felagsins í mong ár. Nú hon er farin í annað starv, fær felagið nýggjan skrivara.

Nýggj heimasíða

Í samband við, at Vinnuhúsið ger nýggja heimasíðu, fær eisini Ráðgevarafelagið nýggja heimasíðu.

Umboðan mótvegis myndugleikum og samfelagnum sum heild

Felagið virkar støðugt fyri at vera sjónligt í samfelagnum viðvíkjandi okkara arbeiðsøkjum, so okkara sjónarmið um hesi vera hoyrd. Sum dømi um hetta kann nevnast, at ráðgevarafelagið varð kallað inn í rættarnevndina á fund tann 22. apríl 2022 í samband við uppskot um Suðuroyðartunnilin.

Støðan nú og frameftir

Nógv virksemi seinastu árini

Nógva virksemið og stóri eftirspurningurin í føroyska samfelagnum sum heild, hevur havt týðilig ringárin við sær í føroysku tænastuvinnunum. Serliga ráðgevarafyritøkurnar í byggivinnuni hava havt úr at gera. Fleiri ráðgevarafyritøkur eru lagstar afturat og talið á starvsfólkum í føroysku ráðgevaravinnuni hevur verið vaksandi – soleiðis hevur eisini verið í farna ári.

Føroyska ráðgevaravinnan hevur drúgvar royndir og breiða vitan um øll sløg av arbeiðum, sum tørvur er á at fáa gjørt í Føroyum, og ráðgevaravinnan hevur strembað eftir, at hetta eisini fer at vera so í framtíðini, tí fyrimunirnir eru nógvir.

Í fyrsta lagi verða vitanarstørv varðveitt í landinum, og í øðrum lagi er ráðgevingin smidligari, tá hon verður veitt í nærumhvørvinum. Í triðja lagi eru føroysku tímatakstirnir lægri enn í grannalondunum. Harafturat

kemur, at føroyska samfelagið hevur stórt gagn av, at vitanin um at byggja bygningar og aðra nýgerð eftir føroyskum fortreytum verður varðveitt og ment her á landi.

Korona

Korona heimsumfarsóttin, sum rakti Føroyar, er nú løgd aftur um og er ikki longur eitt tema, sum verður viðgjørt av Ráðgevarafelagnum og vit sum vinnugrein tykjast at vera komin rættuliga snikkaleys í gjøgnum.

Hagtølini fyri 2020

Umsetningurin hjá ráðgevaravinnuni í Føroyum hevur seinastu árini bara gingið ein veg, og tað er uppeftir. Árið 2020 var onki undantak, tvørturímóti. Hetta gjørdist besta árið nakrantíð. Samlaði umsetningurin hjá limunum í Ráðgevarafelagnum í 2020 var knappar 204 milliónir krónur.

Tað vísir árliga kanningin, sum Ráðgevarafelagið ger millum fyritøkurnar, sum eru limir í felagnum. Felagið spyr um kundabólkar, uppgávuslag, samsýningarform og umsetning.

Fyri fyrstu ferð er samlaði umsetningurin hjá limunum í Ráðgevarafelagnum farin upp um 200 mió. krónur. Í 2019 var tætt við – tá var umsetningurin 190 mió. krónur. Í 2018 høvdu ráðgevarafyritøkurnar tilsamans 170 mió. kr. í umsetningi.

Kommunurnar vanliga størst

Kanningin hjá Ráðgevarafelagnum vísir,at størsti kundabólkurin hjá ráðgevarunum í 2020 var kommunurnar. Ráðgevingin fyri kommunur fylti 42% av uppgávunum. Næststørsti kundabólkurin er privatavinnan, sum fevndi um 32% av ráðgevingini.Uppgávurnar fyri tað almenna stóðu fyri 23% í fjør.

Kommunurnar hava flestu árini verið størsti kundin hjá ráðgevarafyritøkunum. Einasta undantakið var í 2019, tá ið privata vinnan var størsti kundin.

Mest bygningar

Vanliga fevnir mesta arbeiðið í ráðgevaravinnuni um bygningar, og so var eisini í 2020. 65% av virkseminum var bygningar, 27% var anlegg og 7% planlegging. Í 2019 fyltu anleggini annars lutfalsliga nógv í uppgávunum hjá ráðgevarunum, tí tá vóru anleggini 38% av uppgávunum.

Tá ið tað snýr seg um samsýningarhátt, er fastprísur (tilboð) tann mest vanligi. 52% av umsetninginum stavar frá fastprísi. 31% vóru tímar uttan loft og 16% tímar við lofti.

80% av limunum í Ráðgevarafelagnum svaraðu kanningini hesaferð.

Í løtuni verður arbeitt við at innheinta hagtølini fyri virksemið í ráðgevaravinnuni fyri 2021.



Skjal 1

Limalistin

- Afry Føroyar
- Arkitektar 99 v/Jóhan Laksafoss
- Brim Arkitektar
- Byggitrygd Sp/f
- Drauschke Consult Føroyar Sp/f
- EYA Arkitektur Design
- Farcon
- Fjalar Sp/f
- FORMO P/F
- Fuglark Sp/f
- Henning Larsen NA Sp/f
- HMP Consult, ráðg. verkfrøðingar
- Kontrast Sp/f
- LBF
- Lon - Byggifrøðilig Ráðgeving
- MAP Arkitektar Sp/f
- Martin E. Leo Sp/f - ráðg. verkfr.
- MP Tek Sp/f
- Ove Mortensen Arkitektavirkið
- PB - Consult
- Ráð Sp/f
- Sámal Johannesen
- Selmar Nielsen Arkitektar Sp/f
- SMJ Ráðgevandi verkfrøðingar P/F
- Spenn, Sp/f
- Steingrund Akustik Sp/f
- Zeta Architects

Skjal 2

Viðtøkur felagsins

§ 1

Navn felagsins er Ráðgevarafelagið og heimstaður felagsins er Tórshavn.

§ 2

Endamál felagsins er at savna allar ráðgevandi fyritøkur við heimstaði í Føroyum, serliga í byggivinnuni at útinna felags áhugamál.

Í virki sínum skal felagið skipa fyri felags menning í vinnugreinini, bæði í virkjunum, og av teimum karmum virkað verður undir. Millum limirnar skal felagið stuðla undir samskifti og førleikamenning, og úteftir virka sum felags málgagn mótvegis myndugleikum, stovnum og aðrari vinnu.

§ 3

Umsóknir um limaskap skulu sendast nevndini, sum tekur støðu til umsóknina. Avgerð nevndarinnar kann kærast fyri limafund, sum tekur endaliga avgerð.

§ 4

Limirnir hava skyldu at halda lógir felagsins. Tær avgerðir, ið aðalfundurin ella nevndin taka, eru bindandi fyri limirnar.

Um limur ikki vil ganga undir eina tílíka avgerð, kann nevndin koyra viðkomandi úr felagnum uttan ávaring, og kann hesin ikki gerast limur aftur tey næstu tvey árini. Áðrenn viðkomandi verður limur aftur, skal møgulig skuld til felagið verða goldin.

Tvey árs eftirstøða inniber, at limur av sær sjálvum missir limaskapin. Áðrenn limaskapurin kann fáast aftur, skal øll skuld til felagið verða goldin.

§ 5

Árliga limagjaldið verður ásett á ársaðalfundinum. Fult limagjald verður eisini goldið fyri innlimingarárið. Inngoldið limagjald verður nýtt til rakstur felagsins í tann mun, sum nevndin, heldur at tørvur er á.

Skuldi tað í felagnum verið tørvur á meira peningi fyri at fremja serlig mál, so kann nevndin útvega henda pening við tilskotum frá limunum. Eisini kann aðalfundurin, til útvegan av slíkum peningi, álíkna limunum eykagjald.

Nevndin hevur heimild til at tekna lutapening ella partapening í øðrum feløgum eftir góðkenning frá aðalfundinum.

Felagið verður bundið við undirskrift formansins ella honum, ið er í hansara stað. Til dagligu umsitingina av sjálvum felagnum kann nevndin geva skrivara fulltrú.

§ 6

Nevndin tekur sær av áhugamálum felagsins, hevur fyrisætið við sjálvum felagnum og ansar eftir, at felagsins lógir og samtyktir verða hildnar. Allar avgerðir á nevndarfundum verða samtyktar við vanligum meiriluta.

§ 7

Aðalfundurin hevur hægsta ræðið í felagnum.

Limirnir hava eina atkvøðu fyri upp til 3 ársverk, millum 4 og 10 ársverk tvær atkvøður, millum 11 og 20 ársverk tríggjar atkvøður, millum 21 og 50 ársverk fýra atkvøður og fyritøkur við fleiri enn 51 ársverkum fimm atkvøður.

Eitt árs eftirstøða í limagjaldi inniber miss av atkvøðurætti.

Limur kann geva øðrum limi skrivliga fulltrú at umboða seg á aðalfundinum.

§ 8

Ársaðalfundurin verður hildin eina ferð um árið - ikki seinni enn 1. mai.

Lýst verður til vanliga aðalfundin minst 14 dagar frammanundan. Nevndin ásetir tíð og stað fyri aðalfundin, og avger á hvønn hátt hann verður lýstur.

Dagsskráin á vanliga aðalfundinum er henda:

1. Val av fundarstjóra

2. Framløga av limalista

3. Frásøgn nevndarinnar frá farna ári

4. Framløga av grannskoðaðum roknskapi frá farna ári

5. Val av nevndarlimum og eykalimum

6. Val av grannskoðara

7. Áseting av limagjaldi fyri komandi árið

8. Ymiskt

Allar samtyktir á aðalfundinum skulu verða skrivaðar í gerðabókina.

§ 9

Øll mál, felagnum viðvíkjandi, kunnu viðgerast á vanligum aðal- ella eykaaðalfundi. Lógarbroyting kann bert fara fram, tá ið uppskot um lógarbroytingina er sett fram frammanundan, og uppskotið er lýst í kunngerðini um aðalfundin.

Til at broyta felagslógirnar krevst vanligur meiriluti.

Har ikki annað er tilskilað í lógunum, verða allar avgerðir samtyktar við vanligum meiriluta.

Er vanligi aðalfundurin ikki viðtøkuførur, kann samtykt verða gjørd um at kalla saman til eykaaðalfundar. Á eykaaðalfundinum kann slíkt uppskot verða samtykt við minst 2/3 av teimum atkvøðum, ið eru umboðaðar á fundinum, sjálvt um ikki helvtin av limunum er á fundi.

§ 10

Í nevndini sita 3 ella 5 limir. Limirnar sita í 2 ár[1]. Valt verður millum limir felagsins. Harumfamt verða 2 tiltakslimir valdir hvørt ár.

Nevndin skipar seg sjálv. Á hvørjum nevndarfundi verður gerðabók førd, sum verður undirskrivað av hjástøddu nevndarlimum.

Nevndin kann seta kassameistara og skrivara.

§ 11

Eykaaðalfundurin kann verða hildin, tá ið í minsta lagið 2 nevndarlimir ella limir, ið umboða minst 1/5 av atkvøðunum, krevja tað. Nevndin ásetir tíð og stað fyri eykaaðalfundin, sum verður kunngjørdur við minst 7 daga ávaring.

§ 12

Felagsins roknskaparár er álmanakkaárið.

Roknskapur verður grannskoðaður av felagsins grannskoðara.

§ 13

Felagið kann verða avtikið við aðalfundarsamtykt, treytað av at minst 2/3 av samlaðu atkvøðunum í felagnum atkvøða fyri. Uppskot um felagsins avtøku má tó verða lýst fyri limunum eins og uppskot um lógarbroyting.

§ 14

Verður felagið tikið av, verða ognir felagsins at nýta til frama fyri endamál, sum avtøkuaðalfundurin tekur avgerð um.

---

[1]Nevndarvalið verður skipað soleiðis: 2 limir verða valdir annað hvørt ár og 1/3 limir annað hvørt ár.

Skjal 3

Veitingarskrá felagsins

Veitingar frá føroyskum ráðgevarafyritøkum	Arkitektavirkir									Verkfrøðingavirkir													
Virkisstødd	**Arkitektar 99**	**FORMO**	**Kontrast**	**MAP Arkitektar Sp/f**	**BRIM ARKITEKTAR**	**Fuglark**	**Henning Larsen NA Sp/f**	**Selmar Nielsen Arkitektur - SNA**	**ZETA architects**	Lon - Byggifrøðilig Ráðgeving	Fjalar	Áfry Føroyar	Drauschke Consult Føroyar Sp/f	LBF Ráðgevandi verkfrøðingar	SMJ ráðgevandi verkfrøðingar	Martin Leo Sp/f	RÁÐ, Ráðgevandi verkfrøðingar	HMP Consult	PB Consult	Steingrund Akustik	SPENN sp/f	FarCon	MP-Tek sp/f
0-3 Starvsfólk		x								x	x	x	x				x					x	x
4-10 Starvsfólk	x		x	x	x	x	x		x							x		x	x	x	x		
11-50 Starvsfólk								x						x	x								
Slag av virki																							
Arkitektavirki	x	x	x	x	x	x	x	x	x														
Verkfrøðingar Konstruktiónir													x	x			x	x			x	x	x
Verkfrøðingar HVS													x		x	x			x				
Verkfrøðingar EL												x		x	x								
Verkfrøðingar, akustik																				x			
Byggifrøðingar			x				x	x	x	x	x		x	x		x							
VEITINGAR																							
Byggiharraráðgeving																							
Hugskot	x	x	x	x	x	x	x	x	x		x	x	x	x	x	x	x				x	x	
Teknisk finansieringsanalysa											x	x			x	x						x	
Byggiskrá	x	x	x	x	x	x	x	x	x		x	x	x	x	x	x	x				x	x	
Uppmáting og skráseting	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x				x	
Fíggjarráðgeving	x		x	x		x	x	x	x	x	x	x			x	x	x						
Ráðgeving																							
Heildarráðgeving	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x		x	x	x
Fakráðgeving	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x
Fakeftirlit	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x
Byggileiðsla	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x		x	x	x
Projekteringsleiðsla	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x		x	x	x
Kostnaðarmeting og -stýring	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x		x	x	x
Góðsku- og váðaleiðsla	x		x	x	x	x	x	x	x		x	x	x		x	x	x		x			x	
Umhvørvisleiðsla														x	x	x			x				
Kontrahering	x	x	x	x	x	x	x	x	x		x	x	x	x	x	x	x		x		x		
Bygningssýn	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x						x	
Orkukanning	x		x		x		x	x			x	x	x	x	x	x			x				
Inniklimakanning											x			x	x	x		x	x				
Ljóðkanning																				x			
Projektering																							
Nýbygging	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x
Tilbygging	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x
Umvæling og umbygging	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x
Restaurering	x	x	x	x	x	x	x	x	x		x	x	x		x	x	x	x	x	x	x		x
Anleggsuppgávur																							
Vegir	x	x	x	x	x		x	x	x		x			x		x	x	x					
Parkeringsøkir	x	x	x	x	x	x	x	x	x		x			x		x	x	x					
Parkeringshús	x		x	x	x	x	x	x	x		x		x	x		x	x	x			x		
Parkeringstunlar												x											
Brúgvar	x		x	x	x		x	x	x			x	x	x			x	x			x		
Tunlar												x		x		x	x	x			x		
Havnir og kajøkir	x		x	x	x		x	x	x					x		x	x	x			x		
Flogvallir			x	x	x		x	x	x					x		x	x	x			x		
Bygningsrakstur																							
Rakstrar- og viðlíkahalds ætlan		x	x	x	x	x	x	x	x	x	x		x		x	x			x				
Implemetering av rakstrar- og viðlíkahalds ætlan	x		x	x		x	x	x	x	x	x				x	x			x				
Bistand til rakstur			x	x		x	x	x	x	x	x				x	x			x				

	Arkitektavirkir									Verkfrøðingavirkir													
	Arkitektar 99	FORMO	Kontrast	MAP Arkitektar Sp/f	BRIM ARKITEKTAR	Fuglark	Ósbjørn Jacobsen Arkitektar	Selmar Nielsen Arkitektur - SNA	ZETA architects	Lon - Byggifrøðilig Ráðgeving	Fjalar	Afry Føroyar	Drauschke Consult Føroyar Sp/f	LBF Ráðgevandi verkfrøðingar	SMJ ráðgevandi verkfrøðingar	Martin Leo Sp/f	RÁÐ, Ráðgevandi verkfrøðingar	HMP Consult	PB Consult	Steingrund Akustik	SPENN sp/f	FarCon	MP-Tek sp/f
Bygningar																							
Einbýlishús - sethús	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x		x	x	x	x	x	x	x	x	x		
Ibúðarhús í fleiri hæddum	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x		x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	
Gistingarhús o.t.	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x		x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	
Sjúkrahús	x		x	x	x	x	x	x	x		x		x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	
Røktarheim o.a	x	x	x	x	x	x	x	x	x		x		x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	
Samkomuhús og kirkjur	x	x	x	x	x	x	x	x	x		x		x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	
Undirvísingarbygningar	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x		x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	
Dagstovnar	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x		x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	
Handlar og sølubygningar	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x		x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	
Skrivstovuhøli o.t.	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x		x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	
Ítróttarbygningar	x	x	x	x	x	x	x	x	x		x		x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	
Farstøðir	x	x	x	x	x	x	x	x	x		x		x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	
Idnaðarbygging	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x		x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x
Orkustøðir	x		x	x	x	x	x	x	x		x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	
Aðrir tekniskir bygningar	x		x	x	x	x	x	x	x		x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x
Tekniskar anleggsuppgávur																							
Spillvatnsskipanir															x	x			x				
Fjarhitaskipanir															x	x		x	x				
Vatnveitingarskipanir															x	x			x				
Olju- og gasskipanir															x	x			x				x
El veitingar skipanir												x		x	x								
Renovatiónsskipanir															x	x			x				
Háspenningsskipanir												x											
Planlegging																							
Landslagsplanlegging	x		x	x	x	x	x	x	x														
Býarplanlegging	x		x	x	x	x	x	x	x					x									
Byggisamtyktir	x		x	x	x	x	x	x	x		x						x						
Býarbygging og býarúm	x		x	x	x	x	x	x	x														
Serstakar byggisamtyktir	x		x	x	x	x	x	x	x		x						x						
Ljósætlanir												x											
El-modellering												x											
Design																							
Standard Innbúgv	x	x	x	x	x	x	x	x	x														
Standard Útgerð	x	x	x	x	x	x	x	x	x														
Sniðgeving av innbúgv	x		x	x		x	x	x	x														
Skelting	x	x	x	x	x	x	x	x	x		x												
Listpríðing	x		x	x	x	x	x	x	x														

	Arkitektavirkir									Verkfrøðingavirkir													
	Arkitektar 99	**FORMO**	**Kontrast**	**MAP Arkitektar Sp/f**	**BRIM ARKITEKTAR**	**Fuglark**	**Ósbjørn Jacobsen Arkitektar**	**Selmar Nielsen Arkitektur - SNA**	**ZETA architects**	Lon - Byggifrøðilig Ráðgeving	Fjalar	Afry Føroyar	Drauschke Consult Føroyar Sp/f	LBF Ráðgevandi verkfrøðingar	SMJ ráðgevandi verkfrøðingar	Martin Leo Sp/f	RÁÐ, Ráðgevandi verkfrøðingar	HMP Consult	PB Consult	Steingrund Akustik	SPENN sp/f	FarCon	MP-Tek sp/f
Onnur ráðgeving																							
BIM/3D projektering	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x		x	x		x	x	
IKT	x		x	x	x	x	x	x	x	x	x		x	x	x	x			x			x	
Visualisering	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x		x		x			
Animering	x	x	x	x		x	x	x	x	x					x	x		x					
Modell	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x	x		x										
Brunaráðgeving	x		x	x		x	x	x	x	x	x		x		x	x		x					x
Akustisk ráðgeving	x		x			x							x							x			
Auralisering																				x			
Ferðslu ráðgaving							x					x		x		x	x						
Maskin konstruktiónir												x			x								x
Prosesstøkni		x										x			x	x							x
Jarðfrøði														x				x					
Lívfrøði																							
Tilbúgving											x				x								
Umhvørvi																							
Burðardygd							x	x			x	x			x	x							
VVM kanningar															x	x							
Orkumetingar							x				x	x			x	x			x				
Jørðdálking																							